**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 1489, Sp/f Atli Midjord, 960 Hov.

Viðtøkur broyttar: 07.12.2001.
Roknskaparar: 01.01-31.12.
Umleggingarár: 01.03.2001.-31.12.2001.

Skráseting Føroya tann 18. januar 2002

Kristin Balle

---

http://www.sosialurin.fo
Sosialurin
www.sosialurin.fo

i
Sosialurin

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

Skrásetingar-nr. P/F 3305
Navn: P/F Atlantic Invest
Hjánøvn: P/F Atlantic Building Invest (P/F Atlantic Invest), P/F Atlantic Building Contractors Invest (P/F Atlantic Invest), P/F Faroe Invest (P/F Atlantic Invest) og P/F North Atlantic Invest (P/F Atlantic Invest)
Adressa: Fjalsgøta 35, 100 Tórshavn
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 20.12.2001
Viðtøkudato: 20.12.2001
Kapitalur: Kr. 500.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 500.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: P/F Atlantic Plast, Fjalsgøta 35, 100 Tórshavn (P/F 2326)
Nevnd: Maria Lava, Fjalsgøta 35, 100 Tórshavn (formaður), Páll Magnar Kjærbæk, 970 Sumba og Olaf Lava, Fjalsgøta 35, 100 Tórshavn.
Stjórn: Páll Magnar Kjærbæk, 970 Sumba.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av nevndarformanninum , av einum stjóra ella av tveimum nevndarlimum saman.
Grannskoðari: : P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 20.12.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er íløguvirksemi, harundir at gera íløgur í fastogn, feløg, virðisbrøv, valuta v.m.

Skráseting Føroya tann 17. januar 2001

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

Skrásetingar-nr. P/F 3304
Navn: P/F Atlantic Bygging
Hjánøvn: P/F Atlantic Building Contractors (P/F Atlantic Bygging), P/F Faroe Bygging (P/F Atlantic Bygging) og P/F North Atlantic Plast Bygging (P/F Atlantic Bygging)
Adressa: Fjalsgøta 35, 100 Tórshavn
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 20.12.2001
Viðtøkudato: 20.12.2001
Kapitalur: Kr. 500.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 500.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: P/F Atlantic Plast, Fjalsgøta 35, 100 Tórshavn (P/F 2326)
Nevnd: Páll Magnar Kjærbæk, 970 Sumba (formaður), Maria Lava, Fjalsgøta 35, 100 Tórshavn og Olaf Lava, Fjalsgøta 35, 100 Tórshavn.
Stjórn: Maria Lava, Fjalsgøta 35, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av nevndarformanninum saman við einum stjóra ella av nevndarformanninum saman við einum nevndarlimi, ella av allari nevndini saman.
Grannskoðari: : P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 20.12.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er byggivirksemi og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 17. januar 2001

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 751, P/F Grønanes, 350 Vestmanna.

Nevnd:
Farin frá sum formaður: Pauli Poulsen, 350 Vestmanna.
Innkomin sum formaður: Bárður Poulsen, 350 Vestmanna.
Farin úr nevndini: Joen Gert Poulsen, 350 Vestmanna.
Innkomin í nevndina: Eyðbjørn Poulsen, 350 Vestmanna.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Joen Gert Poulsen, 350 Vestmanna.fo
Innkomin sum stjóri: Pauli Poulsen, 350 Vestmanna.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóra ella av allari nevndini.

Skráseting Føroya tann 18. januar 2002

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 651, Sp/f Ragnar Poulsen, 466 Ljósá.

Viðtøkur broyttar: 18.10.2001.
Strikan av hjánavni: Sp/f Sandblásing (Sp/f Ragnar Poulsen)
Nýtt navn: Sp/f Sandblásing
Grannskoðari:
Farin frá sum grannskoðari: Sp/f Eysturoyar Bókhaldsstova, Gerðisvegur, 600 Saltangará
Innkomin sum grannskoðari: Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, 480 Skáli.

Skráseting Føroya tann 18. januar 2002

Kristin Balle

---

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin

Sosialurin
Sosialurin
i

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 192, P/F Trol- & Snørisvirkið, 700 Klaksvík.

Viðtøkur broyttar: 26.10.2001.
Nýtt navn: P/F Snørisvirkið
Nevnd:
Farin úr nevndini: Benjamin Joensen, Garðavegur 15, 700 Klaksvík (formaður), Harriet Isaksen, 700 Klaksvík og Hansa Joensen, Garðavegur 15, 700 Klaksvík.
Innkomin í nevndina: Jónfinn Thomsen, 360 Sandavágur (formaður) og Rúni Berg, 620 Runavík.
Stjórn:
Farnir frá sum stjórar: Hansa Joensen, Garðavegur 15, 700 Klaksvík og Jógvan Isaksen, Víkavegur 93, 700 Klaksvík.

Skráseting Føroya tann 17. januar 2002

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 293, P/F Poul Michelsen, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 21.12.2001.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Geert Jørgensen, Trekronervej 3, DK-4330 Tolløse.

Skráseting Føroya tann 17. januar 2002

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 352, P/F Poula Midjord, 960 Hov.

Viðtøkur broyttar: 07.12.2001.
Roknskaparar: 01.01-31.12.
Umleggingarár: 01.03.2001.-31.12.2001.

Skráseting Føroya tann 18. januar 2002

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

Skrásetingar-nr. P/F 3299
Navn: P/F Faroe Marine Biotech
Adressa: 800 Tvøroyri
Kommuna: Froðbiar Kommuna
Stovningardato: 28.12.2001
Viðtøkudato: 28.12.2001
Kapitalur: Kr. 500.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 500.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Hans Egil Olsen, Grannatún, 600 Saltangará, Adrian Dalsá, Grannatún, 600 Saltangará, Lýsi HF, Grandavegur 42, ÍS-121 Reykjavík, P/F Sesam, 800 Tvøroyri (P/F 2888), Maritex A/S, Havnegate, N-8405 Sortland, Norge og Dánjal á Argjaboða, Runebergs Allé 40B, DK-2860 Søborg.
Nevnd: Geir Wilhelm Wold, Grønslettvegen 14, N-8400 Sortland, Norge (formaður), Adrian Dalsá, Grannatún, 600 Saltangará, Katrín Pétursdóttir, Bakkavør 40, ÍS-170 Seltjarnarnes, Dánjal á Argjaboða, Runebergs Allé 40B, DK-2860 Søborg og Ólavur Bjarkhamar, 800 Tvøroyri.
Stjórn: Hans Egil Olsen, Grannatún, 600 Saltangará.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum saman við einum nevndarlimi, av nevndarformanninum saman við einum nevndarlimi ella av trimum nevndarlimum saman.
Grannskoðari: : P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 28.12.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka biotøkniliga menning og framleiðslu av hámentum vørum úr havúrdráttum, gransking, herímillum luttøka í norðurlendskum og altjóða verkætlanum, nýtilevning, førleikamenning, ráðgeving, ídnaður, handil, umboðan og annað virksemi í hesum sambandi.
Skráseting Føroya tann 18. januar 2002

Kristin Balle

---



# Tænastumanna-felag Landsins

## Uppstilling til formansval.

Sambært grein 6 í lógum felagsins verður boðað til uppstilling til formansval í Felag Tænastumanna Landsins.

Uppskot skulu skrivliga vera nevndini í hendi innan 1. februar 2002 við váttan frá uppstillaða.

Formaðurin verður valdur á aðalfundi felagsins.

Aðalfundurin verður lýstur seinni.

**Felag Tænastumanna Landsins**

---

**Fiskimálastýrið**
*Skipaeftirlitið*
*The Ministry of Fisheries and Maritime Affairs*

# GMDSS-radiútgerð

## Viðv. komandi krøvum um GMDSS-radioútgerð á føroyskum fiskiskipum

Av tí at Evropeiska Samveldið (ES) hevur samtykt, at øll fiskiskip, sum koma inn á teirra sjóøki eftir 1. februar 2002, skulu vera útgjørd við GMDSS-radio-útgerð, verður tað neyðugt at dagføra reglurnar um GMDSS fyri føroysk fiskiskip.

Reglurnar um GMDSS-radioútgerð í dag eru galdandi fyri verandi og nýggj fiskiskip 24 m. ella longri. Tær nýggju reglurnar koma at merkja, at øll fiskiskip, sum fara í ES sjógv, hereftir koma at vera umfatað av kravinum um GMDSS-radioútgerð.

Ætlanin er at seta reglurnar í gildi frá 1. februar 2002.

Av tí at vit eru kunnað um, at ein ávís leveringstíð er til at fáa GMDSS-radioútgerðina frá einum veitara, vil Skipaeftirlitið viðgera umsóknir um undantaksloyvi frá kravinum í einum tíðarskeiði, sum ikki fer útum 6 mánaðir eftir, at reglurnar eru komnar í gildi.

Krøvini til ta kravdu radioútgerðina eru í mun til radiodekningsøkið, sum skipið siglir í.

Farleiðin í norðuratlandsøkinum frá Grønlandi, Íslandi, Føroyum, Skotlandi, í Norðsjónum, fram við norsku strondini og í Eystursjónum, verður roknað sum A2-radiodekningsøki, meðan økið uttanfyri, undantikið polarøkið, er roknað sum A3-radiodekningsøki.

Eitt neyvari yvirlit yvir hetta sæst á einum GMDSS-radiodekningskorti.

Veitararnir av GMDSS-radioútgerð kunnu sannlíkt eisini upplýsa nærri um hetta, og um prísir á útgerð alt eftir, um skipið skal útgerast til A2- ella A3-dekningsøki.

**Skipaeftirlitið**

---

KIRKJUBØAR KOMMUNA

# Pedagogur

Søkt verður eftir einum pedagogi at arbeiða á stovu við 2-5 ára gomlum børnum.
Nær: At byrja 15. februar (ella eftir avtalu)
Arbeiðstíð: 35 tímar um vikuna (ella eftir avtalu)
Løn og arbeiðsviðurskifti eftir sáttmálanum hjá Føroya Pedagogfelag.

**Í Barnagarðinum á Velbastað** eru 40 børn millum $^1/_2$ og 9 ár.
Tey eru í 3 aldursbýttum stovum: 0-2 ár, 2-5 ár og 5-9 ár.

Barnagarðurin er í friðarligum umhvørvi, næstan í haganum. Børnini eru úr Kirkjubø, av Velbastað og úr Havn. Tað tekur eitt korter at koyra úr Havn, og eisini ber til at koyra við Bygdaleiðum.

Vit vænta, at tann, sum verður sett/ur í starv
- dámar væl at vera úti í náttúruni
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni
- vil vera við til at seta sín dám á stovnin

Umsókn við prógvi og møguligum viðmælum skal vera barnagarðinum í hendi í seinasta lagi 6. februar 2002.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Barnagarðin á tlf. **31 81 21** og spyrja eftir leiðaranum.

**Barnagarðurin á Velbastað**
FO-176 Velbastað
velbarn@post.olivant.fo

---

**Eysturoyar Javnaðarfelag**

# Uppstillingarfundur

1. uppstillingarfundur verður á Sjómansheiminum í Runavík mikukvøldið 23.01. kl. 20.00.

Við á fundinum verða Jóannes Ejdesgaard og Dan Reinert Petersen.

**Nevndin**

---

# Norðskála/Oyrar skúli

Søkt verður eftir lærara til 18-20 tímar um vikuna frá 1. februar til summarfrítíðina.

Umsóknir skulu verða skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 28.01.02.

**Skúlastýrið í Sunda kommunu**
**Nomi Jacobsen · 460 Norðskáli**

---

# Pedagogar!!!

Dagstovnurin í Kvívík søkir eftir einum pedagogi, at starvast fyri pedagog, sum fer í farloyvi í eitt ár, frá 1. mars 2002 til 1. mars 2003.

Starvið er í vøggustovuni 40 tímar um vikuna.

Vit vænta tú hevur hug at verða saman við teim yngstu á stovninum og kann vera við til at geva teimum ein tryggan og góðan uppvøkstur.

Dagstovnurin í Kvívík er normeraður til 10 børn í aldrinum 0-3 ár og 20 børn í aldrinum 3-7 ár.

Starvið er lønt eftir sáttmála hjá Føroya Pedagogfelag.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi, í seinasta lagi 15. februar 2002.

Meir fæst at vita um starvið, við at venda sær til stovnin á tlf. 421660. Spyr eftir leiðaranum.

**Dagstovnurin í Kvívík**
FO-340 Kvívík

---

# Arbeiðsfólk søkist

Til skúlan og ítróttarhøllina á Giljanesi, verður søkt eftir arbeiðsfólki.

Arbeitt verður bara í vikuskiftunum.

Arbeiðið umfatar: Vaktarhald og reingerð.

Løn samb. sáttmála við Føroya Arbeiðarafelag.

Upplýsingar um arbeiðið fáast við at venda sær til Jógvan S. Hansen, formaður í Hallar– og Skúlanevndini. Tlf.: 221864 og 333064

**Miðvágs og Sandavágs kommunur**

---

FØROYA HANDILSSKÚLI
TEKNISKI SKÚLIN TÓRSHAVN
Team 85 • 316511

# Teldukoyrikort

**Undirvíst verður týsdagar kl. 8.30-1215 og 16.15-20.00**

| Skeið | Dagar | Kostnaður |
|---|---|---|
| Windows | 12/2, 19/2, 26/2 | 1900 |
| Word | 5/3, 12/3, 19/3, 9/4 | 2600 |
| Excel | 16/4, 23/4, 30/4, 7/5 | 2600 |
| Access | 14/5, 21/5, 28/5, 4/6 | 2600 |
| Power Point | 11/6, 18/6 | 1500 |
| Internet | 20/8, 27/8, 3/9, | 1900 |
| Grundsk. í teld | 10/9, 17/9, 24/9 | 1900 |

Fyri tey, ið melda seg til øll sjey skeiðini er kostnaðurin **kr. 10.000,-**

Lærari í Teldukoyrikortinum er: **Martha W. Dalsgaard**

*Skeiðini verða hildin treytað av at nóg nógvir luttakarar tekna seg. Nágreiniligir upplýsingar um skeiðinnihald og tilmeldingarblað fáast við at venda sær til*

**SKEIÐSDEPILIN VIÐ MARKNAGIL * SDM**
Marknagilsvegur 77 • Postrúm 177 • 110 Tórshavn • Tel 31 88 13 • Fax 31 33 74, T-postur: fh-sth@post.olivant.fo • Heimasíða http://sth.olivant.fo